## Summer of ’69 í juni

Tíðindini komu út í gjár, og á tíðindafundi í morgun kundi Five Star Entertainment so staðfesta, at Bryan Adams vitjar í Føroyum 4. juni í 2008. Við lyfti um største tónleikatiltak í Føroyum hevði Five Star Entertainment boðið til tíðindafund í dag. Longu í gjárkvøldið kundi poartalurin staðfesta, at Tórshavn stóð á listanum hjá Bryan Adams fyri konsertir 2008, og tað var eisini hetta, sum var boðskapurin á tíðindafundinum í morgun. Verður sæð burtur frá festivalunum, sum hava verið skipaðir seinnu árini, so hava konsertir í Føroyum verið javnsettar við innandura upplivingar, men soleiðis verður ikki hesaferð. Endaliga plaseringin er enn ikki staðfest, men tað ljóðar, at mest sannlíka staðið er Skálatrøð í Havn, og at atgongumerkini verða millum 4.000 og 5.000 í tali. Hetta varð tó ikki váttað á tíðindafundinum, tí enn skal trygdarviðurskiftini kring tiltakið fáast endaliga upp á pláss. Sjálv atgongumerkini til konsertina verða sett til sølu í morgin. Fyrst á Torginum í SMS, og síðani á Kunningarstovuni í Havn og á heimasíðuni hjá Eik Banka.

# Syngjandi myndamaðurin

**Tað er ein av teimum heilt tungu dreingjunum í tónleikasøguni, sum kemur til Føroya komandi summar. Ein tungur drongur, sum eisini hevur havt hópin av framúrskarandi myndaframsýningum**

TÓNLEIKUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*




*Seinnu árini hava fleiri stór tónleikanøvn vitjað í Føroyum. Men Bryan Adams hevur helst munin á øllum hinum, tá hann kemur til Føroya 4. juni komandi ár*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Bryan Adams, sum fyri stuttum helt 48 ára føðingardag hevur í nærum fjórðings øld verið roknaður millum tungvektarnar innan meira popputa partin av rocktónleikinum.

Við Cuts Like A Knife í 1983 hevði hann nøkur løg, sum leitaðu sær upp á hitlistarnar, men veruliga gjøgnumbrotið fekk hann í 1984, tá Reckless varð send á marknaðin. Ikki færri enn seks singlur av hesi útgávuni komu á top-20 listan í Kanada. Við klassikarum sum Somebody, Heaven, Run to You og Summer of ’69 varð navn hansara sligið fast við 12-tumma seymi. Útgávan hevur síðani selt til fimm-dupult platin í USA. Og síðani hetta gjøgnumbrotið hevur hann støðugt leitað móti hæddunum innan tónleikin. Øll árini saman við guitarspælara sínum, Keith Scott. Eitt nú hevur hann met á ensku single-hitlistanum, har I Do It For You var ovast á listanum 16 vikur. Talan var her um eitt soundtrack til Robin Hood filmin, Prince of Thieves, men umframt hetta hevur hann eisini gjørt sondtrack til ikki færri enn 41 aðrar filmir.

Fýra ferðir hava løg hansara verið ovast á Billboardlistanum. Hann hevur móttikið Order of Canada og Order of British Columbia, eins og hann í 1998 fekk sítt merki á kanadiska Walk of Fame. Tríggjar ferðir hevur hann verið nomineraður til Academy Awards fyri sangskriving, og fimm ferðir hevur hann verið nomineraður til Golden Globe fyri filmstónleik sín.

### Uppvaksin í seks londum

Uppvøksturin hjá Bryan Adams má sigast at vera heldur merkisverdur. Og í øllum førum lítið støðugur. Hann varð føddur í Kingston, Ontario tann 5. november í 1958, men uppvøksturin var tó ógvuliga blandaður. Pápin var diplomatur, og tí vaks tann ungi Bryan upp í Onglandi, Kanada, Ísrael, Fraklandi, Portugal og Australia. Sum bara 15 ára gamal gavst hann í skúlanum, tí hann heldur vildi royna seg sum tónleikara.

Og tað hevur sum so gingið mikið væl. Við fleiri enn 75 milliónum seldum eintøkum er talan um ein sannan risa innan yrki. Ikki minst hava mongu konsertferðir hansara verið serstakliga væl vitjaðar, og merkisvert er her, at talan mest sum alla tíðina hevur verið um somu manning. Við sær á palli hevur hann teir báðar vinirnar, Keith Scott (guitar) og Mickey Curry (trummur), sum báðir hava verið saman við Adams í fjórðings øld. Og hartil eru Gary Breit (keyboard) og Norm Fisher (bass), sum báðir hava verið síðani fyrst í hesi øldini.

### Myndamaðurin

Umframt tónleikin, so hevur Bryan Adams í fleiri ár eisini verið íðin myndamaður. Og tað er ikki sørt, at myndir hansara hava vakt ans. Soleiðis hava tær verið prentaðar í tíðarritum sum Vogue, Vanity Fair, Harper’s Bazaar og Esquire.

Hann hevur eisini tikið myndir av Elizabeth drotning Philip prinsi, og er ein av hesum myndum í dag at síggja á National Portrait Gallery í London. Og fyri eina myndarøð við Mickey Rourke fekk hann í 2006 serliga gull-virðisløn.



Jól í Glasstovuni

1. desember, 7. desember, 14. desember og 15. desember bjóðar Glasstovan stóra jólamatskrá

5 rættir:
- Føroyskur tallerkur.
- Toskanakki við safransós og saute.
- Berberidunnubringa og svínalundir við lakaðum blommum og rótfruktum, pom anna og orangessós.
- Osta volauvent.
- Mandlurís við karamelkremi og kanelísi.

Prísur fyri hvønn kr. 525,-

Íroknað prísin er:
5 rættir, drykkivørur og dansur.

Bíleggið borð á tel. 317500
ella á hf@hotelforoyar.fo

GLASSTOVAN
The Favourite Restaurant

Tel 31 75 00 • hf@hotelforoyar.fo
hotelforoyar.fo